H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

Tórshavn, hin 14. apríl 2003
Málnr.: 614 -200000840-10
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: HE / 35 64 25

Interkommunali
Renovatiónsfelagsskapurin
Postrúm 39
FO-520 LEIRVÍK

# UMHVØRVISGÓÐKENNING AV UMLASTISTØÐINI ÚTI Í TRØLLAVÍK Í SUÐUROY


**1. HEIMILD**....................2

**2. UMSÓKNIN**....................2

2.1 AV VIÐKOMANDI TEKNINGUM ERU:....................2
2.2 AV ØÐRUM VIÐKOMANDI UPPLÝSINGUM ERU:....................2

**3. LÝSING AV VIRKSEMINUM**....................2

**4. LÝSING AV UMHVØRVISVIÐURSKIFTUM**....................3

**5. MÁLSVIÐGERÐ**....................3

**6. GÓÐKENNINGARTREYTIR**....................3

6.1 INNRÆTTING OG RAKSTUR....................3
6.2 MÓTTØKA, VIÐGERÐ OG GOYMSLA AV SERLIGA DÁLKANDI BURTURKASTI....................4
6.3 LUFT, LUKTUR OG LJÓS....................5
6.4 ÓLJÓÐ OG RISTINGAR....................5
6.5 SPILLVATN....................5
6.6 SÝNISTØKUR....................6
6.7 BURTURKAST....................6
6.8 ÓHAPP....................6
6.9 INNANEFTIRLIT....................6
6.10 RAKSTRARSKRÁSETING OG UMHVØRVISFRÁGREIÐING....................6

**7. ALMENT**....................7

**KÆRUVEGLEIÐING**....................7



Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

**UMHVØRVISGÓÐKENNING**
**AV UMLASTISTØÐINI ÚTI**
**Í TRØLLAVÍK Í SUÐUROY**

# 1. Heimild

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvis-verndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til Umlastistøðina hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum L/F á leigaðum øki í Trøllavík í Hjallaskorahaga, matr. nr 166, í Hovs kommunu. Umhvørvisgóðkenningin verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um "Góðkenningartreytir" niðanfyri, og upplýsingum, ið eru móttiknar saman við umsóknini.

# 2. Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk hin 17. september 2002 umsókn um víðkan av verandi umhvørvisgóðkenning frá 17. mai 1998, HS-mál 200000840-1 (gl. HS-málnr. 614-97-0011-3). Hin 6. mars 2003 fekk Heilsufrøðiliga starvsstovan umsókn um endurnýggjan av somu góðkenning, ið gongur út 17. mai 2003.

Saman við umsóknini eru móttiknar tekniskar upplýsingar um virksemið og kort, sum sýna staðsetingina og innrættingina av Umlastistøðini.

### 2.1 Av viðkomandi tekningum eru:

- Staðseting av umlastistøðini (Akt 4, skjal 1, 1:20000).
- Støðumynd yvir økið (Akt 4, skjal 2, 1:1000).
- Innandura og uttandura umlasting (Akt 4, skjal 3, dagf. 10-09-02, 1:200).
- Kloakkplanur (Akt 4, skjal 4, dagf. 10-09-02, 1:200).

### 2.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru:

- Umsókn um víðkan av umlastivirksemi (Akt 4).
- Umsókn um endurnýggjan av verandi góðkenning av umlastistøðini (Akt 7).
- Galdandi góðkenning fyri Umlastistøðina (Akt 1).
- Myndir av økinum (Akt 4, skjal 4 og 5).

# 3. Lýsing av virkseminum

Umlastistøðin verður staðsett á leigaðum øki í Trøllavík í Hjallaskorahaga, matr. nr. 166 í Hovs kommunu.

Endurskoðanin av góðkenningini umfatar upprunaliga góðkenningina, ið varð givin til ein bygning, ið er 13,5 x 8,5 metur, við einum síðubygningi til fólkarúm. Í hesum partinum verður burturkast frá innsavningini av burturkasti í Suðuroy, ið skal brennast. Burturkastið verður umlastað í trýstbingjur, sum eru tættar. Til umlastingina verður nýtt ein komprimator og trýstbingjur.

Víðkanin av góðkenningini umfatar eitt øki vestanfyri verandi bygningin: Ein tilbygningur verður gjørdur vestan fyri verandi umlastistøð, hesin er ætlaður til skiljing av jarni og umlasting av pappi. Bygningurin hevur sama skap sum vestari parturin av verandi bygningi. Í norðurendanum stendur

ein flutningslast 3,0 m undir gólvhædd. Krani ella loypikattur verður brúktur til at lasta bingjuna. Hesin parturin verður tikin í nýtslu á heysti 2004.

Vestan fyri tilbygningin verður økið planerað og básar verða gjørdir til fyribils goymslu av skildum burturkasti: jarni, køli- og frystiútgerð ( 2000-3000 $m^3$/ár), bildekkum ( 2000-3000 stk/ár), trolum ( 100-200 $m^3$/ár) og stórsekkjum ( 200-400 $m^3$/ár). Harafturat verður á økið sett eina last til uppsamling av bilvrakum ( uml. 150 stk/ár) og eini serbingju til elektro (EE) og serliga dálkandi burturkast. Vestast á økinum verður ein tangi til uppsamling av spillolju ( uml 200 $m^3$/ár), tangin verður settur í ein tættur tangagarður, ið kann halda aftur møguligum lekum. Hesin parturin verður tikin í nýtslu á heysti 2003.

Básar, bingjur og oljutangi verða tømd, so hvørt sum ein hóskandi nøgd er í teimum. Burturkastið verður flutt til Tórshavnar við Strandferðsluni, og haðani til endaliga viðgerðarstaðið.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Størstu møguligu einstøku dálkingarkeldurnar frá rakstrartrupulleikum ella óhappum verða mettar at vera oljulekar frá: bilvrakum; frá serliga dálkandi burturkasti; ella um leki kemur á spilloljutanga. Onnur møgulig dálking kann stava frá lutum, ið fúka við vindinum.

Einki ætlað útlát verður frá serliga dálkandi burturkasti ella oljugoymslu.

Undir øllum økinum verður asfalterað, og verður alt frárensl frá økinum leitt gjøgnum oljuskiljara, áðrenn tað verður leitt í kloakk og haðani á sjógv.

## 5. Málsviðgerð

Grundarlagið undir málsviðgerðini eru fyrst og fremst tær upplýsingar, sum eru móttiknar í omanfyri lýsta tilfari.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:

- At vandin fyri dálking av ytra umhvørvinum í sambandi umlasting og goymslu av burturkasti verður so lítil sum gjørligt
- At óneyðugir ljóð- , lukt- og dustampar ikki standast av virkseminum.
- At útleiðing av spillvatni skal vera sambært galdandi reglum, ella vegleiðing frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av fylgjandi ásetingum:

### 6.1 Innrætting og rakstur

6.1.1 Plássið skal innrættast og rekast, sum ávíst í móttikna tilfarinum.

6.1.2 Einki burturkast má vera uttanfyri tey øki, ið eru gjørd til hetta.

6.1.3 Økið, ið hoyrir til virkið, skal vera týðiliga merkt og haldast ruddiligt og reint.

6.1.4 Økið, ið verður nýtt til umlasting, skal vera innigirt við 2 metrum høgum hegni við portri, ið kann læsast.

6.1.5 Áir og løkir skulu veitast uttanum plássið, soleiðis at einki vatn rennur inn á økið.

6.1.6 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum.
6.1.7 Starvsfólkini skulu vera kunnug við innihaldið í hesi góðkenningini.
6.1.8 Øll øki, ið hoyra til virkið, har møguleiki er fyri, at kemisk evni so sum olja kunnu leka, skulu vera úr tøttum tilfari.
6.1.9 Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar altíð verða hildnar.
6.1.10 Virkið hevur skyldu til altíð at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]) fyri at minka mest møguligt um øll útlát, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar. Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt fyri at avmarka dálkingina mest møguligt. Tey kemikaliu, ið nýtt verða, skulu hava minst møguligt árin á umhvørvið.
6.1.11 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.
6.1.12 Verður Umlastistøðin avriggað, ella skal økið nýtast til annað endamál, skal hetta góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 6.2 Móttøka, viðgerð og goymsla av serliga dálkandi burturkasti

6.2.1 Serliga dálkandi burturkasti skal goymst í bingju, so burturkastið er vart móti regni og vindi.
6.2.2 Móttøkan til serliga dálkandi burturkast skal læsast eftir arbeiðstíð.
6.2.3 Móttøkan skal vera mannað, tá ið opið er.
6.2.4 Serliga dálkandi burturkast kann bert latast ábyrgdarhavandi starvsfólki, ið hevur luttikið á skeiði í handfaring av serliga dálkandi burturkasti.
6.2.5 Nøgdin av serliga dálkandi burturkasti í móttøkuni má ikki fara upp um 5000 kg.
6.2.6 Móttøkan skal vera innrættað við tøttum gólvi, og við so mikið høgum kanti, at gólvið í minsta lagi skal kunna rúma innihaldið í størsta ílatinum, tó í minsta lagi 200 litrar. Í staðin fyri ein kant, kann gerast ein grøv við rist ella uppsamlingartanga, ið kann rúma størsta ílatinum ella í minsta lagi 200 litrum.
6.2.7 Undirlendið, har serliga dálkandi burturkast verður av- og áskipað, skal vera úr tøttum tilfari, t.d. einari heilstoyptari betongplátu ella asfalterað. Plássið skal skrána móti einum frárensli, ið kann læsast, ella eini grøv/tanga, sum rúmar innhaldinum av størsta ílatinum, ið plássið nýtir, ella í minsta lagi 200 l.
6.2.8 Grøv ella tangi at taka ímóti møgiligum lekum skula vera úr tilfari, sum er mótstøðuført móti øllum teimum serliga dálkandi evnum, ið verða móttikin á støðini, og skulu tømast hvørja ferð, leki hevur verið. Tað, ið likið er, skal viðgerast sum serliga dálkandi burturkast.
6.2.9 Á økinum skal neyðug útgerð vera til taks at taka upp møguligar lekar.
6.2.10 Serliga dálkandi burturkast má undir ongum umstøðum goymast uttanfyri móttøkuna.
6.2.11 Í móttøkuni skal vera eitt skáp, sum kann læsast, til goymslu av týningarevnum (og tómum pakkitilfari), ið er merkt $T - T_x$.
6.2.12 Móttikna burturkastið skal, um møguligt, skjótast gjørligt pakkast í rætta pakningin, so óætlaðar støður ikki uppstanda. So hvørt sum pakningur er fullur, skal hesin merkjast eftir forskriftunum og skrásetast.
6.2.13 Rakstrar- og trygdarfyriskipan skal, áðrenn móttøkan verður tikin í nýtslu, og tá ið broytingar verða gjørdar av hesi, sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni til góðkenningar. Treytirnar úr umhvørvisagóðkenningini, sum eru tengdar at rakstrinum, skula standa í rakstrar- og trygdarfyriskipanini. Rakstrar- og trygdarfyriskipanin skal latast starvsfólkunum og vera atkomilig á staðnum.
6.2.14 Undir tanga til spillolju skal vera ein tættur tangagarður, ið kann halda aftur lekum, svarandi til innihaldið av fullum tanga.

---
[1] Best Available Technology.

6.2.15 Tá ið spillolja verður latin í ella latin úr spilloljutanganum, skal hetta gerast soleiðis, at dálking ikki stends av hesum, undir samankomingum skal vera ein bakki ella líknandi at taka spill.
6.2.16 Spilloljutangin skal vera undir regluligum eftirliti.

## 6.3 Luft, luktur og ljós

6.3.1 Virksemið má ikki verða atvoldin til royk-, lukt- ella dustampar uttanfyri økið hjá virkinum.
6.3.2 Um ampar verða av dusti, lukti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.
6.3.3 Bingjur haðani pappír ella líknandi kann fúka, skula vera yvirdekkaðar.
6.3.4 Nýtsla av ljósum á umlastistøðini skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

## 6.4 Óljóð og ristingar

6.4.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá virkinum, fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark, á nevndu økjum og tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mána. - fríggja. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mána. - fríggja. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnaøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnaøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Tað mestloyvda óljóðstøðið frá virkinum mált innandura í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

6.4.2 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av ristingum.
6.4.3 Um ampar verða av ristingum, lágfrekventum óljóði ella infraljóði, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

## 6.5 Spillvatn

6.5.1 Frárenslvatn frá innandura økjum og frá teimum pørtum av økinum uttandura, har ið roknast kann við oljuspilli, skal leiðast gjøgnum góðkendan oljuútskiljara við sandfangi.
6.5.2 Oljuskiljarin skal hava sjálvvirkandi flotlæsara og ávaringarskipan, ið boðar frá, tá ið hann skal tømast.
6.5.3 Oljuskiljarin skal tømast eftir tørvi, men í minsta lagi eina ferð um árið.
6.5.4 Uppsamlað olja skal burturbeinast sum oljuburturkast.
6.5.5 Sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av spillvatninum, skal vera eftir oljuskiljara.
6.5.6 Frárenslvatnið má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking. Oljuinnihaldið í spillvatninum má í mesta lagi vera 10 mg/l, kannað sambært DS/R 208.
6.5.7 pH í frárenslvatninum frá virkinum skal vera 6,5 – 9,0.

6.5.8 Spillvatn frá vesum skal leiðast í rottanga.
6.5.9 Alt spillvatnið skal leiðast í lokaðum røri beinleiðis í sjógv út á eitt dýpi, sum altíð er 1 metur undir á hægstu fjøru.

## 6.6 Sýnistøkur

6.6.1 Eina ferð um árið skulu sýni takast av spillvatninum, í sýnistøkubrunni eftir oljuskiljara. Týttleikin av sýnistøkum kann verða broyttur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.6.2 Vatn úr sýnistøkubrunni skal kannast fyri:

- Mineralska olju
- pH
- Hita
- Leiðingarevni
- Pb, Cd og Hg

## 6.7 Burturkast

6.7.1 Alt húsarhalds- og virkisburturkast skal viðgerast í samsvari við galdandi lóggávu
6.7.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og tað skal skiljast sundur sambært ásetingum frá móttakara.

## 6.8 Óhapp

6.8.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum upprudding, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Størri óhapp skulu so skjótt sum gjørligt fráboðast til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 6.9 Innaneftirlit

6.9.1 IRF skal hava regluligt eftirlit við móttøkustøðini, tó minst 2 ferðir um árið. Eftirlitsfrásagnir í sambandi við innaneftirlitsvitjanir skulu sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.9.2 Kanningar sambært góðkenningartreytunum kunnu verða umbidnar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.9.3 Øll sýnistøka og meting av úrslitum verður goldin av virkinum.
6.9.4 Øll sýnistøka skal gerast av felag, sum er góðkent av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.9.5 Øll sýnistøka skal gerast, meðan framleiðslan er í fullari gongd.
6.9.6 Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 6.10 Rakstrarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

6.10.1 Skrásetast skula allar nøgdir av innkomnum og avskipaðum burturkasti, tilskilað eftir slagi.
6.10.2 Skrásetingarnar skula vera á staðnum, og eftirlitsmyndugleikin skal kunna síggja tær eftir umbøn. Skrásetingarnar skula goymast í 5 ár.
6.10.3 Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingunum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, tulking av kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk, skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuna í seinasta lagi 1. apríl í avloysandi árinum.

## 7. Alment

- Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.
- Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
- Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.
- Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg. ( t.d. frá Arbeiðseftirlitinum og Brunaumsjón Landsins)
- Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:
  1) nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin.
  2) dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
  3) dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.
- Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya landsstýri við neyðugum skjølum.
Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Vinarliga

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-110 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-110 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Hovs kommuna, FO-960 Hov
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu, FO-800 Tvøroyri.